Frá Føroya Postfelag:

## Aðalfundur 2007

Aðalfundur felagsins verður í HB-húsinum tann 24. februar kl. 10.00

Uppskot frá limunum skulu skrivliga verða nevndini í hendi í seinasta lagi 3 vikur áðrenn aðalfundin.

Av tí at formaðurin fer frá í úrtíð, verður valg av nýggjum formanni á aðalfundinum.

Uppskot til formannsvalevni skulu verða nevndini í hendi innan 10. februar við váttan frá uppstillaða

***NEVNDIN***

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## 12 skeið á Náttúruvísindadeildini

Í vár bjóðar Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum 12 skeið (lærugreinar) innan lívfrøði og kolvetnisverkfrøði. Til ber at melda seg til og taka prógv í hvørjum teirra, og soleiðis brúka hetta sum ein eftirútbúgvingarmøguleika ella ein møguleika fyri at endurnýggja kunnleika um ávís evni.

Upplýsingar um skeiðini og um førleikakrøv til teirra eru at finna undir »Lestur á Komandi studentar« á heimasíðuni www.nvd.fo. Har eru eisini umsóknarbløðini at finna, eins og upplýsingar um lærubøkur.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Náttúruvísindadeildina, tel 352550.

Umsóknarbløð skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Boks 2109, FO 165 Argir. Freistin at søkja er 25. januar 2007.

STARVSMANNAFELAGIÐ

## Uppstilling til nevndarval í Starvsmannafelagnum

Vísandi til § 9, stk. 5 í lógum felagsins skal uppskot til nevndarlimir verða felagnum í hendi innan 1. februar 2007. Valið fer fram á aðalfundinum, sum verður leygardagin 17. mars 2007.

***Starvsmannafelagið***

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

## Fyribilsskráseting 2007

Skal fyribilsskatturin verða rættur, mugu vit hava rættar upplýsingar um B-inntøku og frádráttir.

**B-inntøka**
B-skatturin í 2007 verður roknaður út frá teimum upplýsingum, tú hevur givið á sjálvuppgávuni 2005.

Er B-inntøkan broytt í 2006, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2007.

**Frádráttir**
Hevur tú frádráttir, er neyðugt at upplýsa okkum um teir.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðublað til at rætta ella skráseta fæst á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum, á posthúsum, og kann verða heintað á heimasíðuni: www.tollskatt.fo

Tú ert vælkomin at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar vit hava um tíni skattaviðurskifti.

*á Argjum, 19. januar 2007*

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

## Írestandi skattur og AM-gjald 2006

Freistin at gjalda írestandi skatt og írestandi AM-gjald fyri skattaárið 2006 er 31. januar 2007. Verður goldið innan henda dag, slepst undan eykagjaldinum á 4%.

Útrokningarforrit er at finna á heimasíðuni **www.tollskatt.fo**

Eisini ber til at rokna írestandi skattin út í bóklinginum »Skattinum 2006«, ið øll húski fáa í januar 2007.

Tá skatturin verður goldin, skal viðmerkjast: p-tal og »Skattur 2006«. Gjaldið skal setast inn á eina av hesum kontum hjá Føroya Gjaldstovu:

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Banki | 6460 | 260.005.8 |
| EIK | 9181 | 185.012.3 |
| Norðoya Sparikassi | 9865 | 185.016.9 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870 | 100.090.0 |
| GIRO | 9909 | 50.040 |

*á Argjum, 19. januar 2007*

## Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800

# Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir einum skrivstovulærlingi til skrivstovuna hjá Thomas Dam Ítrótti & Damfar.

**Starvið**
Starvið fevnir um bókhald, fakturering, tollavgreiðslu, telefon-avgreiðslu og annað vanligt skrivstovuarbeiði.
Arbeiðistíðin er mánadag til fríggjadag 8.00 – 16.00.
Løn sambært S&K.

**Krøv**
Roknað verður við, at umsøkjarin hevur HH, HF ella student prógv.

Harumframt er tað ein fyrimunir um tú:
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni.
- Ert álítandi og tekur ábyrgd av tínum arbeiði.
- Ert arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Umsóknir**
Umsókn við prósvkjølum, og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **31. januar 2007.**

ÍTRÓTTUR Damfar

Postboks 154 · 110 Tórshavn

VEGNA SP/F KJALNESBÚÐIN Í KONKURS
**VERÐUR HANDILSINNBÚGVIÐ Í HANDLINUM LÝST TIL SØLU**

Talan er um hesar lutir:

- Terminalur
- Kassatól
- Vekt
- Roknimaskina
- Telefaks
- 8 frystiskáp við glashurðum
- 3 frystiboksir
- Handilshillar

Yvirlit yvir frammanfyri nevndu handilslutir og nærri upplýsingar annars kunnu fáast við at venda sær til Advokatfelagið við Strond 4, Mimi Steintórsdóttir, adv.ft.

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR